Suðuroyar Ellis- & Røktarheim

søkir sjúkrahjálpara (fulla tíð við skiftandi vaktum) til 1. oktobur 1984.

Umsókn við avriti av prógvum v. m., verða at senda til Fyristøðukvinnuna, Suðuroyar Ellis- & Røktarheim innan 17. septembur 1984.

BRÚKTUR BILUR ER EITT ÁLITISMÁL



VIT HAVA GÓÐAR BRÚKTAR BILAR Á GOYMSLU

SÁMULIGIR PRÍSIR — LAGALIG FÍGGING

NISSAN pf AUTO Service Tlf. 10101

Lýsið í sosialinum



Á hvíta tjaldinum



Leikhús Bio sýnir í hesum døgum:

Fyrr stjólu tey ungu, bardust, gjørdu herverk og »lænta« bilar. Nú drepa tey — í USA í hvussu so er.

Um hetta er filmurin, um harðskapin millum tey blaðungu í USA.

Eftir ymisk brotsverk, rán, dráp og neyðtøku, enda tveir figgindar av misgávum í sama fongsli. Tað slepst ikki undan endaliga bardaganum millum teir báðar.

Filmurin sigst vera ráur, men sannur. Hann vísir eisini, hvussu tilveran er í amerikonskum fongslum. Bardagarnir, sum ikki blivu avgjørdir úti á gøtunum, halda fram innanfyri múrarnar.

Ú. F.

Týsdagur 11.

09.30 **Á jazzstevnu**
11.01 **Stuttsøga**
12.55 **Føroyski skipalistin**
19.00 **Barnaútvarpið**
Oddvá Nattestad leggur til rættis.
19.30 **Á jazzstevnu**

Mikudagur 12.

09.30 **Hovdaman, sum bleiv bóndakona á Strondum.**
Fyrilestur eftir Hans Marius Debes.
11.01 **Kvøduljómar til sjófólkið**
19.00 **Ungdómssendingin**
19.30 **Løg mær dámar**
Kári D. Petersen velur løgini.

Umsetingin sum oyðilegði alt

Neyðars gamla Dimma bleiv ikki heimskend hesaferð. Nú kundi hon avdúka alla russiska njósning í Føroyum. Ein loyndarfullur lepi, funnin í viðalundini í Havn, var avgerandi prógvið — til hann var umsettur.

Leysliga umsetingin uttan orðabók av nøkrum slag, gjørd av fólki, ið ikki er russiskt, men polskt, oyðilegði alt.


Lepin var ein leiðbeining hjá sjómanni um, hvussu hann skal bera seg at í vanda umborð. Dupult spell. Nú noyddist Dimma at siga okkum, sum annars, millum annað av hennara ávum, halda ilt um russar, at hugsað verður um trygdina umborð á russiskum skipum.

Tí lepin kom í blaðið kortini. Ikki sum aldarinnar forsíðusøga, men á síðu 4. Tí, hetta var nakað fyri seg og ikki nakað, sum hendir á hvørjum degi.


Men, men ... kanska hevur russiski sjómaðurin ikki havt reint amerikanskt mjøl í posanum kortini, tí hann hevur límað nakrar smærri lepar omanyvir sumt av tí handskrivaða vinstrumegin á lepanum og (nú verður spennandi) taka vit nakað av tí límaða burturfrá, stendur okkurt annað handskrivað inni undir??

Nei, sum gamla konan, næstan javngomul Dimmu, segði: »Oh, Hellig Enfold!!!«.

hd



RUSSISKUR PAPPÍRSLEPI FUNNIN. Um hálvan juli mánað í ár fann 10 ára gamal Havnar drongur sín pappírslepa í Viðarlundini í Havn. Lepin var skrivaður á russiskum, partvist við russiskari skrivimaskinu og partvist við penn. Lepin lá í grasinum, og leik drongurin eyga á hann, meðan hann klintradi í einum trø, nakað burtur frá gerðini. Seinni er tað sum skrivað var á lepanum, umsett av fólki, ið ikki er russiskt, men polskt, og tí leyðliga umsett uttan orðabók av nøkrum slag. Av tí hetta var nakað fyri seg og ikki nakað sum hendir á hvørjum degi, endurprentu vit her bæði russiska og umsetta lepan. Umsetarin skilti ikki handskriftina rættiliga, men hetta var tað, vit fingu burturúr brævinum. Tað tykist, sum tann, ið mist hevur pappírið, hevur skulu minnast til, hvussu ein skal bera seg at á skipi, tá ræðuligt vanlukka hendir. Her skal eisini víðmerkjast, at viðkomandi hevur líms nakrar smærri lepar omanyvir sumt av tí handskrivaða vinstrumegin á russiska brævinum, og teka vit nakað av tí límaða burturfrá, stendur okkurt annað handskrivað inni undir.



ÚF

Reportasja um Leygarkvøldsgestirnar Rosu og Karl

Tað ungur nemur, gamal fremur.

Orðatøk eru ongantíð heilir sannleikar. Tað er ikki alt, tú tekur at tær sum barn, tú brúkar, tá tú ert vorðin vaksin.

Vónandi gloyma lurtarar »Barnaútvarpsins« ikki tað, tey nú hoyra um brekað. Hetta er væl gjørt og — best av øllum — ósentimentalt.

Nógv er sagt, skrivað og víst um brekað nú í nøkur ár. Tað hjá »Barnaútvarpinum« er uppi í tí fræga. Bert spell, at viðurskiftini hjá øllum øðrum børnum ikki fáa eins seriøsa viðgerð.

Hetta er nakað, sum vit siggja allastaðni í samfelagnum síðani ár teirra brekaðu. Tey vanligu, um loyvt er at siga so, børnini eru næstan gloymd í allari vælvildini móti teimum óvanligu.

Broyting í skránni

Eitt hava teir báðir beiggjarnir, ÚF og SVF, felags.

Skráirnar, teir senda bløðunum og harvið lurtarum og hyggjarum, eru verri enn so altíð eftirfarandi. Sendingar koma afturat, onkrar detta burtur og aðrar koma ístaðin. Og ongantíð nøkur frágreiðing um, hví tann prentaða skráin ikki kann haldast.

Reportasja« skuldi vera hóskvøldið. Vit fingu endursent eitt hoyrispæl um Rosu Luxembourg og Karl Liebknecht, sum so eisini vóru »Leygarkvøldsgestur«.

Løgtingsval er um slakar tveir mánaðir. Tað má tí sigast at vera óheppið, at eitt valevni sleppur at lesa morgunlestur í eina heila viku so stutt fyri val.

Morgunlesturin er ikki bara lestur úr halgum bókum, men eisini orð, lesarin sjálvur setir saman.

Høgni Djurhuus

Aftur í Smiðjuni

Í morgin letur upp listaframsýning í Smiðjuni í Litluvík. Tað er Bjarne Werner Sørensen, sum sýnir tekningar, litteknингar og málningar, hann millum annað hevur gjørt í summar, meðan hann hevur búð í Froðba, haðani mamma hansara er ættað.

Bjarne Werner Sørensen, sum er á fjórða ári á »Det Jyske Kunstakademi«, hevur fyrr havt framsýning í Smiðjuni. Tað var í september 1982.

Framsýningin nú er opin 12. — 16. september kl. 15—20.

